# ELUR FLESTU **PLANT**



MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG

*Áðrenn Niels Pauli Danielsen fór frá sum sóknarprestur fyri aldur, fóru hann og Elsebeth at leita sær eftir húsum. Valið fall á húsini í Varðabú í Havn, og tað var ikki minst orsakað av stóra økinum uttan um húsini*

Í **VARÐABÚ** Í HAVN HEVUR **ELSABETH DANIELSEN** FYRI FJÓRÐU FERÐ Í LÍVI SÍNUM GJØRT EIN URTAGARÐ HEILT FRÁ GRUNDINI. EIN HUGNALIG OG **FRIÐARLIG LUND** MITT Í BÝNUM

**SAMRØÐA**
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Tá ið Elsebeth og Niels Pauli Danielsen fyri fleiri árum síðan fóru at fyrireika seg til, at hann skuldi fara frá sum sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi, fóru tey at hyggja seg um eftir húsum at keypa. Í Klaksvík búðu tey í prestagarði.

Tey leitaðu bæði í Klaksvík og í Havn, og valið fall á húsini, sum Kristian Eli og Jenny Lamhauge fyri umleið 60 árum síðan bygdu sær í Varðabú í Havn.

Tað var ikki minst orsakað av stóra grundstykkinum, at tey valdu at keypa júst tey húsini. Men tað taldi sanniliga eisini við, at Varðabú var at kalla mitt í býnum og ein blindvegur. Eitt friðarligt umhvørvi og hartil veðurgott.

Tá ið tey høvdu keypt húsini fyri sjey árum síðan, fór Elsebeth beinanvegin til verka.

– Eg hugsaði fyrst um, hvussu økið lá í mun til veður og vind og sólargang, og so fór eg í gongd, sigur Elsabeth.

## Ger alt sjálv

Hon spurdi seg eisini fyri, hvat tað kostaði at fáa útbúgvin urtagarðsfólk at gera arbeiðið, men so nógv vildi hon ikki lata.

Elsabeth hevur áður gjørt tríggjar aðrar urtaarðar frá grundini, í Ónagerði á Viðareiði, á Gjarðanesi á Strondum og í prestagarðinum á Brekku í Klaksvík. Hon setti seg væl føra fyri at gera hetta eina ferð aftrat.

– Tað er so stuttligt at síggja, at alt skal vera vaksið so nógv eftir fáum árum, sigur hon.

Grundstykkið er 1100 fermetrar, og hon hevur verið ígjøgnum alt.

## Veðurgott

– Her er so vælsignað veðurgott. Sóilin skínur altíð her. Ommubørnini siga, at sjálvt um tað regnar í Gundadali, skínur sólin altíð hjá ommu. Her er eingin ferðsla, og tað hoyrist ikki eitt kis. Fyri tað kundi hetta tað sama verið í Múla, sigur Elsebeth.

Tá ið tey keyptu húsini, varð kjallarin innrættaður fyrst, og tá ið tað arbeiðið var liðugt, kundi Elsebeth halda til har, og gernadisdagarnar var hon í Havn og arbeiddi hvønn dag í urtagarðinum.

– Eg gróv og gróv.

Í urtagarðinum vóru fleiri stór trø. Nøkur teirra noyddust at lúta fyri at fáa meira ljós. Hekkurin var blómandi ribes. Hann var gamal, og tí valdi Elsebth at fáa hann burtur.

Frá einum granna fekk hon efeu, sum nú prýðir veggin móti grannanum omanfyri.

– Tað mesta, sum veksur her, havi eg alt fram sjálv. Okkurt havi eg keypt, og okkurt havi eg fingið. Sumt havi eg tikið úr urtagarðinum, sum vit høvdu í Klaksvík, sigur Elsebeth.

Í tí stóra urtagarðinum eru fleiri ymisk bed við grótlaðing uttanum. Elsebeth hevur skil fyri, nær hvør einstøk planta blómar, og hon setir planturnar niður soleiðis, at altíð er nakað, sum blómar í hvørjum bedi.

Uppi í einum lerkatræi hongur ein lampa, og uttan um bedið, har